GIST Á BÁTAFESTIVALINUM

Bed & Breakfast





EITT GISTINGARHÚS VIÐ FJØLBROYTTUM MØGULEIKUM!

Gistingarhúsið er Inni á Fjørð í Vestmanna, við góðum útsýni yvir bátahylin.

KRÁKUREIÐRIÐ
Krákureiðrið í Vestmanna

Tel 42 47 47 • fartel 76 47 47 • jf.egilsnes@kallnet.fo

# Fjørukrógvin bjóðar buffet

Vilmund Jacobsen

Hann er royndur í leikum á sínum øki. Útbúgvingina sum kokkur tók hann á Hotel Hafnia, og hann hevur bæði starvast sum kokkur í Føroyum og í Danmark. Seinastu tvey árini, áðrenn tók við starvinum í Fjørukrónni um hálvan apríl, sigldi hann í tvey ár sum hovmeistari við Norrønu.

## Góð buffet

Nú bátastevna verður í Vestmanna í vikuskiftinum, bjóðar Fjørukrógvin buffet leygarkvøldið.

– Hetta verður ein góð buffet við eitt nú oksakjøti, høsnarunga, salati, góðari suppu og desert – og eisini verður okkurt kalt at fáa, sigur Rúni Djurhuus, kokkur.

Hann leggur aftrat, at tað kennist sum ein stór avbjóðing at hava átikið sær at lyfta Fjørukrónna upp á eitt hægri støði.

– Eg fari at byggja á tað, sum hevur verið, men málið hjá okkum er at gera tað enn betri og meiri forvitnisligt, enn tað hevur verið áður.

Rúni sigur, at uppgávan hjá honum á Fjørukrónni í fyrsta lagi verður at taka sær av døgurðanum – og síðan at gera salat og sandwich til kvøldini.

- Eg eri einsamallur kokkur, men tá nógv er at gera, havi eg góð fólk at hjálpa mær, bæði í køkinum og við tænastuni. Vanliga manningin á Fjørukrónni er annar kokkur og tænari.



*Rúni Durhuus er royndur sum kokkur, og nú er hann í føstum starvi á Fjørukrónni í Vestmanna, har hann bjóðar buffet á bátafestivalinum leygardagin*

*Mynd: Birgir W. Høgnesen*

## Afturt í land

Rúni sigur, at honum dámdi væl umborð á Norrønu, men eftir at hava siglt í tvey ár, hevði hann hug at koma í land aftur.

- Tá eg so fekk bjóðað arbeiði á Fjørukrónni í Vestmanna, tók eg av, og nú vil eg royna at gera mítt besta, sigur Rúni Djurhuus.

# Ein upplivingarmiðdepil

**VESTMANNA TOURIST CENTRE** Tá tú sigur ferðavinna í Føroyum, so er mest nærliggjandi at hugsa um Vestmanna. Túrarnir undir Vestmannabjørgini munnu vera millum allar fyrstu skipaðu tilboð, sum ferðafólk í Føroyum kundu velja, og teir hava verið á skránni hvørt summar í yvir 20 ár.

Birgir Waag Høgnesen

Í dag eru tvey feløg sum samstarva um siglingina við fýra snøggum túrbátum. Somu feløg reka eisini leiðina til Mykines fyri Strandferðsluna.

Í 2005 bygdu vestmenningar so Vestmanna Tourist Centre, at avgreiða fólkini sum koma við á ferðirnar undir Vestmannabjørgini. Bæði føroyingar og útlendingar vitja í dag ferðavinnumiðstøðina í stórum tali. Matstovan Fjørukrógvin er partur av konseptinum, eins og ein gávubúð sum selur pløgg, tinganeyst og aðrar gávulutir til tey vitjandi.

## Søgusavnið

Og so er tað nýggja Søgusavnið, sum læt upp í fjør. Nógv hava longu vitja savnið, kanska í samband við ein góða sunnudagsdøgurða á Fjørukrónni ella eina útferð undir Vestmannabjørgini. Á Søgusavninum kunnu tey vitjandi uppliva søguna á ein heilt nýggjan og sera spennandi hátt. Søgan verður fortald við einum MP3 spælara á fleiri ymsum tungumálum. Tann vitjandi sær søguligu persónarnar í fullari støðd og mundering og ljós, ljóð og lukteffektir gera upplivingina heilt einastandandi.

Vestmanna Tourist Centre er opið hvønn dag alt summar millum klokkan 9 og 17.

**Vestmanna Tourist Centre liggur við bátahylin í Vestmanna.**

birgir@sos.fo

